


Diana Leo. Mynd: Jensk Kristian Vang

# Keðiligt at oljuleitingin ikki gav meir

**Jógvan Hugo Gardar**

18.10.2014 - 07:12

Oljan.fo

Diana Leo, ið arbeiðir hjá Dong Energy í Keypmannhavn, hevur royndir bæði hjá Dong, Shell og Hess. Hon hevur sum útiseti fylgt við leitinginin undir Føroyum við spenningi. Hon heldur ikki at rætt er at siga at nakað skuldi verið gjørt annarleiðis.

- Nei, eg vil ikki peika á hvat kundi verið gjørt. Tað er altíð lætt at siga aftaná. Eg haldi at gongdin hevur verið góð í samband við leitingina. Persónliga haldi eg at tað er keðiligt at onki bleiv funnið sum vinnuliga letur seg reka. Tað hevði verið spennandi, sigur hon, men roknar við at nú vil ganga rúm tíð áðrenn stóru oljufeløgini vilja royna seg aftur í Føroyum, sigur hon.

Diana Leo er uppvaksin í Vági, men hevur alt yrkislív sítt verið uttanlanda, og kennir oljuvinnuna gott.

- Fíggjarliga støðan hjá fleiri av stóru feløgunum er í løtuni so at tey neyvan fara at seta pengar í oljuleiting kring Føroyar. Uppsagnir eru á veg hjá fleiri stórum fyritøkum, og tey koma at vera varin tá leitast skal í nýggjum økjum, sigur hon.